ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
FARTEKST@MAIL.DK

*Tíðindini um, Castro var sjúkur og trongdu til hvíld fingu góða móttøku millum teir nógvu útlagnu kubanararnar í Florida.*

# Nú ræður tann yngri bróðurin

**Meðan tann 79 ára ganli Fidel er sjúkur, ræður tann 75 ára gamli Raul fyri borgum í Kuba.**

KUBA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Tann 79 ára gamli Fidel Castro hevur latið tann 75 ára gamla Raul røkja forsetaembætið, meðan hann er sjúkur.*

Útlagnir kubanar í USA fóru út á gøtuna at fagna boðunum, tá kubanska sjónvarpið í gjárkvøldið kunngjørdi, at landsins gamli leiðari, Fidel Castro, hevði fingið eina skurðviðgerð, sum kravdi, at hann skuldi hvíla seg í fleiri vikur.

Samstundis kunngjørdi sjónvarpið, at bróður forsetans, Raoul Castro, røkir leiðarastarvið, meðan Fidel hvílir seg. Tað ber í sær, at Raoul nú er forseti, aðalskrivari í kommunistaflokkinum og ovasti fyri kubanska herinum.

Dagliga er Raul Castro varaforseti og verjumálaráðharri, og hann hevur øll árini verið hildin vera tann, sum skal taka við, tá Fidel eina ferð fer frá. Fidel hevur fleiri ferðir avsannað, at hann hevur nakrar ætlanir um at fara frá, men eygleiðarar í Kuba siga, at í seinastuni hevur Raoul verið oftari á sjónvarpsskíggjanum enn fyrr.

Tann almenna frágreiðingin um hvíldina hjá Fidel Castro er, at hann er strongdur eftir eina ferð í Argentina. Sambært sjónvarpinum hevur hann liðið av bløðingum í maganum og noyddist tí á skurðborðið.

**Fagnaður í Florida**

Fyri fimm árum síðani svímaði Fidel Castro, júst sum hann stóð og helt røðu, og fyri tveimum árum síðani datt hann og breyt annað beinið og annan armin. Hesir tilburðir fingu fleiri at gita, at hansara dagar í kubanska leiðarastarvinum vóru farnir at fækka, men síðani hevur heilsan ikki bilað fyrr enn nú.

Castro hevur stýrt Kuba síðani kollveltingina í 1959. Tíðindini um, at hann var sjúkur og trongdi til hvíld, fingu góða móttøku millum teir nógvu útlagnu kubanararnar í Florida. Tey flestu valdu at tulka tíðiindini sum eina fráboðan um, at tann gamli leiðarin verður ikki sitandi við valdið leingi afturat.

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

STUTT SAGT

## Avlíva 50.000 hundar fyri at forða hundaøði

**Í Kina eru trý fólk deyð av hundaøði, og tað kostar túsundtals hundum lívið.**

KINA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Síðani leygardagin hava myndugleikarnir í einum landsparti har suðuri í Kina avlívað umleið 50.000 hundar, eftir at trý fólk har eru deyð av hundaøði. Upprunaliga bóðu myndugleikarnir eigararnar avlíva hundarnar, men tað vildu mong ikki, og tí noyddust myndugleikarnir at fara fram við høðrum, skrivar BBC.

Kinesiskir fjølmiðlar skriva, at myndugleikarnir hava givið eigarunum pengar aftur fyri hundarnar, men upphæddin er sera lítil, verður sagt. Sambært einum blaði er samsýningin minni enn fýra krónur.

Myndugleikarnir hava givið boð um, at allir hundar í landspartinum skulu avlívast, tí annars ber ikki til at basa hundaøðini, siga teir. Tað fekk fleiri túsund fólk at koppseta sínar hundar ímóti hundaøði, men sambært BBC vórðu teir kortini avlívaðir.

Boðini umfata hinvegin ikki teir servandu hundarnar hjá løgregluni og herinum.

## Góðtaka framvegis ikki forsetavalið

**Vinstravongurin í Meksiko vil framvegis ikki viðurkenna, at hann tapti forsetavalið.**

MEKSIKO
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Vinstravongurin kunngjørdi í nátt, at hann fer at seta fleiri tiltøk í verk fyri at krevja, at úrslitið av forsetavalinum herfyri verðurógildað. Útlendskir eygleiðarar siga, at boðini eru er ein greið ábending um, at tann politiska støðan í landinum verður óstøðugari, enn hon longu er.

Eins og í Ukreina á sínni hava fólk á vinstravonginum skipað mótmælislegur í høvuðsstaðnum Meksiko Býi, og í gjár vóru legurnar so tættar nógvastaðni í býnum, at ferðslan lá still. Hetta var serliga galdandi í tí partinum av býnum, sum hýsir nógvum bankum og ymsum fíggjarstovnum.

Forsetavalevnið hjá vinstravonginum, Andres Manuel Lopez Obrador, gisti sjálvur í einari av mótmælislegunum í nátt, og fleiri túsund viðhaldsfólk fagnaðu honum. Hann gjørdi greitt, at mótmælistiltøkini fara at halda fram, og at tey verða víðkað, til almenna valnevndin gongur við til at telja atkvøðurnar frá forsetavalinum 2. juli umaftur.

Sambært valnevndini vann høgramaðurin Felipe Calderón forsetavalið, men munurin millum hann og Obrador var bert 0,6 prosentstig.